# Eik fær 615 milliónir í nýggjum gjaldføri

**Eitt nýtt lánsbræv, ið danskir íleggjarar keypa frá Eik, gevur bankanum 615 mió. kr. í nýggjum gjaldføri. Upphæddin fer til endurfígging av verandi lánum**

**BÚSKAPUR**
*Tíðindaskriv*

- Nýggja lánsbrævaútgávan hjá Eik Banka er eitt tekin um, at marknaðurin nú virkar aftur eftir eitt tíðarskeið, har flestu fíggjarstovnar í heiminum hava hildið sera fast í gjaldførinum, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik, nú bankin hevur útvegað sær 615 mió. kr. á danska marknaðinum við útgávu av einum nýggjum lánsbrævi.

- Vit settu okkum fyri at útvega 500-750 mió. kr. við hesi lánsbrævaútgávuni, og tí eru 615 mió. kr. ein nøktandi upphædd, sigur Finn Danberg, fíggjarleiðari og undirstjóri í Eik.

Lánsbrævið verður í morgin skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn við fyrsta handilsdegi 23. januar 2009.

Upphæddin frá lánsbrævaútgávuni fer í stóran mun til endurfígging av verandi lánum hjá Eik Banka.

Lánið, ið spyrst burtur úr lánsbrævaútgávuni, er eitt fastforrentað obligatiónslán við árligari rentu á 3 prosent. Lánið verður útgivið til kurs 98,701 og innfríað 31. august 2010 til kurs 100. Tað er fevnt av trygdini, danski staturin veitur bankum, ið eru partur av danska fíggjargeiranum.

Fíggjardeildin í Eik hevur samskipað útgávuna av lánsbrævinum, ið Nordea Bank Danmark A/S hevur staðið fyri vegna Eik Banka.

# Bestu leiðararnir skulu finnast



*Ein av hesum trimum verður í morgin kosin sum ársins leiðari innan privata vinnulívið. Frá vinstru eru Bjarni A. Bjarnason, Jan Müller og Regin Jacobsen*

**Fimm man og ein kvinna eru í uppskoti til tær báðar virðislønirnar sum ársins leiðari**

**LEIÐARADAGUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin skipar Synergi fyri ársins leiðaradegi. Og millum tað, sum er á skránni, er kjósanin av ársins leiðara innan tað almenna og tað privata.

Seinastu vikurnar hava fólk havt møguleika at senda inn uppskot til tilnevningar, og nú er greitt, hvørji tey seks eru, sum eru í uppskoti til heiðurin sum ársins leiðari.

Í dómsnevndini, sum skal taka støðu til, hvør skal fáa heiðurin, sita Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla og Mary í Garði, stjóri á Nærverkinum.

Og tey hava nú eisini fingið at vita, hvørji evnini eru, sum tey kunnu velja ímillum.

Innan tað almenna eru kandidatarnir: Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, Petra Jónsdóttir, stjóri á Almannastovuni og Tórmóður Stórá, leiðandi yvirlækni.

Fyri privata vinnulívið eru tríggir mans í uppskoti, og eru hesir Bjarni A. Bjarnason, stjóri á Vodafone, Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, og Jan Müller, stjóri á Sosialinum og Miðlahúsinum.

